Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingsmaður

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Klædnareglur í fólkaskúlanum

Spurningar:

1. Tekur landsstýrismaðurin undir við metingini hjá skúlastjóranum í Vestmanna skúla um, at gentur í nalvablusu órógva arbeiðsumhvørvið á skúlunum kring landið?
2. Metir landsstýrismaðurin, at tað eru gentur og kvinnur, sum sjálvar hava ábyrgdina av, hvussu onnur reagera uppá teirra kropp ella klæði?
3. Metir landsstýrismaðurin, at tað er í samsvari við fólkaskúlalógina, at einstakir skúlastjórar – og ikki skúlastýrini – gera slíkar reglur á fólkaskúlum kring landið?
4. Um so er, at slíkar reglur verða settar í verk, hvør skal so gera av, hvussu stuttur ein niðurdeilur kann vera ella hvussu niðurringað ein blusa kann vera?
5. Hevur skúlin heimild til at seta tiltøk í verk, um slíkar reglur ikki verða hildnar?

Viðmerkingar:

Herfyri kom fram, at nýggjar klædnareglur eru settar í gildi á Vestmanna skúla. Í reglunum stendur, at:

"Fólkaskúlin er eitt arbeiðspláss, har næmingar og lærarar hittast fyri at mennast og læra. Til tess at tryggja eitt ótarnað arbeiðsumhvørvi, er týdningarmikið, at øll eru hóskandi ílatin."

Víðari stendur, at fyri at tryggja hetta "ótarnaða arbeiðsumhvørvið", at:

"klæðini skulu vera hampilig og ikki ov avdúkandi. Stuttir niðurdeilar og shorts ella buksur, ið sita ov niðarlaga eru óhóskandi til skúlabrúks. Somuleiðis eru niðurringaðar blusur og nalvablusur óhóskandi."

Reglurnar eru also galdandi fyri genturnar, sum ganga Vestmanna skúla fyri at tryggja, at lærarar ikki verða órógvaðir á arbeiðsplássinum.

Sama kjak tók seg upp í Danmark fyri nøkrum árum síðani. Tá var ein granskari í kyni, útbúgving og arbeiðsmarknaði í miðlunum og greiddi frá, hvussu slíkar reglur kunnu vera oyðileggjandi fyri genturnar, sum tað gongur út yvir.

Tær fara at kenna seg skeivar og átaka sær skuldina og skommina av, at "onnur" ikki fáa arbeiðsfrið fyri teimum.

Eisini vísir granskarin á, at tað er ein trupulleiki, tá ein skúli velur at gera reglur um pløgg, sum serliga gentur brúka. Hetta er ein patriarkalsk regulering av kvinnum og kvinnukroppum, sum ikki kann sameinast við frælsi og fólkaræði, sum fólkaskúlin sambært endamálsorðingini í fólkaskúlalógini skal fyrireika børnini til. Sí síðstu reglu §2, stk. 3 í fólkaskúlalógini:

"Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði."

Á Løgtingi, 4. mai 2023

Liljan Weihe